glasir.fo/provtokur

# GYMNASIALT MIÐNÁM:

# PRÓVTØKU-FALDARI

## MAI-JUNI 2026

GLASIR
TÓRSHAVN COLLEGE

(útgáva 2, 15. mai 2026)
*- broytingar kunnu koma fyri*

# INNIHALDSYVIRLIT


**1 UM PRÓVTØKURNAR ... 3**

1.1 Fyrireiking til munnliga próvtøku ... 3

1.2 Munnliga próvtøkan ... 3

1.3 Innlatingarskipan til skrivligar próvtøkur ... 3

**2 PRÓVTØKUYVIRLIT OG LOYVDIR HJÁLPARMIÐLAR ... 4**

**3 REGLUR UM SKRIVLIGAR PRÓVTØKUR OG ROYNDIR ... 6**

3.1 Áðrenn próvtøkan ella royndin byrjar ... 6

3.2 Atburður undir próvtøku og roynd ... 7

3.3 Amboð, kravdir og loyvdir hjálparmiðlar og handfaring av teimum ... 7

3.4 Nýtsla av neti og KT tá ið royndin fer fram ... 8

3.5 Tá ið royndin er liðug ... 8

3.6 Eftirlit og agar í sambandi við brot á reglur ... 9

**4 REGLUR UM MUNNLIGAR PRÓVTØKUR OG ROYNDIR ... 9**

**5 SJÚKA Í SAMBANDI VIÐ PRÓVTØKU ... 10**

**6 ENDURPRÓVTØKA ... 11**

**7 UM SVIK ... 11**

**8 KÆRUR UM PRÓVTØKUR ... 11**

**9 INNLATING Í WISEFLOW ... 12**

**GEVIÐ GÆTUR ... 12**

**ÁMINNINGARLISTI ... 13**

# 1 Um próvtøkurnar

Nú próvtøkutíðarskeiðið nærkast er umráðandi, at tú fyrireikar teg væl til próvtøkuna. Í hesum faldara fært tú kunning og góð ráð um skrivligu og munnligu próvtøkurnar.

Halt teg annars kunnaða/n um próvtøkur, reglur, yvirlit og nýggjastu útgávur av próvtøkuvegleiðingini á www.glasir.fo/provtokur.

## 1.1 Fyrireiking til próvtøku

- Áðrenn seinasta undirvísingardag eigur tú at tosa við læraran um próvtøkukrøvini í lærugreinini.
- Tá ið tú veitst, hvørjum lærugreinum, tú skalt upp í, er skilagott at leggja eina ætlan, hvussu tú nýtir tíðina. Legg eina ætlan, sum kann halda.
- Floksfelagar kunnu lesa saman, tit kunnu eisini skipa fyri smærri framløgum, har tit tosa um faklig evni.
- Byrja tíðliga á degnum og gev tær tíð til at halda hóskandi fríløtur.
- Gakk ein túr og fá tær fríska luft av og á. Tað gevur nýggja orku og tíð til at hugsa um tað, tú hevur lisið.
- Fá tær ikki annað arbeiði, meðan tú fyrireikar teg til próvtøku.

## 1.2 Munnligar próvtøkur

- Møt í nóg góðari tíð og í seinasta lagi 30 minuttir, áðrenn munnliga próvtøkan byrjar.
- Hav alt tað við, sum tú hevur loyvi til og tørv á, m.a. okkurt at skriva við. Tak alt, ið tú hevur brúk fyri, niður av netinum og goym tað á teldu tíni, tí einki vanligt netsamband er loyvt undir próvtøkuni.
- Kanna, at teldan er dagførd og klár at nýta.

## 1.3 Skrivligar próvtøkur

- Próvtøkuuppgáva og møgulig fylgiskjøl liggja á WISEflow.
- Latið verður inn talgilt á WISEflow. Bert eitt skjal verður latið inn, sum skal vera í PDF formati. Í einstøkum førum skal skjal latast inn í Excel formati ella hondskrivað.

# 2 Skrivligar próvtøkur og loyvdir hjálparmiðlar

Niðanfyri er **skrivlig próvtøkuætlanin fyri 2026**. Í yvirlitinum er tilskilað, hvørjir hjálparmiðlar eru loyvdir til tær ávísu próvtøkurnar. Legg til merkis, at í ávísum lærugreinum er telda ikki loyvd, og í ávísum lærugreinum er telda eitt krav. Samskifti við onnur enn tey, sum fyriskipa próvtøkuna, er bannað undir próvtøkuni og kann føra við sær burturvísing. Alt talgilt samskifti og nýtsla av vitlíki er bannað.

Próvtøkunetið til skrivligar próvtøkur eitur **Roynd2026**, og loyniorðið til netið er **Roynd2026**. Til allar próvtøkur er eisini loyvt at hava við sær allar orðabøkur, um ikki annað er ásett. Atgongd fæst til teldutøkar orðabøkur hjá Sprotanum og Gyldendal umvegis http://roynd.glasir.fo.

| Dagur | Próvtøka / breyt | Møta | Enda | Viðmerking |
|---|---|---|---|---|
| 18. mai | Enskt A<br>BÚS/HUG/NÁT | 08.30 | 14.00 | Føroysk uppgáva<br>Fyrri partur: Uttan hjálparmiðlar. Uppgávan verður svarað í afturlatnum kaga (FLOWlock) í WISEflow. Telda skal nýtast.<br>Seinni partur: Allir loyvdir hjálparmiðlar kunnu nýtast. Umsetingarforrit, sum kunnu umseta heilar setningar úr einum máli í annað, er ikki loyvt.<br>Uppgávan er BERT tøk á Wiseflow. |
| 18. mai | Enskt B<br>BÚS/FYR/<br>HUG/NÁT | 08.30 | 14.00 | Føroysk uppgáva<br>Fyrri partur: Uttan hjálparmiðlar. Uppgávan verður svarað í afturlatnum kaga (FLOWlock) í WISEflow. Telda skal nýtast.<br>Seinni partur: Allir loyvdir hjálparmiðlar kunnu nýtast. Umsetingarforrit, sum kunnu umseta heilar setningar úr einum máli í annað, er ikki loyvt.<br>Uppgávan er BERT tøk á Wiseflow. |
| 19. mai | Føroyskt A<br>BÚS/FYR/<br>HUG/NÁT | 08.30 | 14.00 | Føroysk uppgáva<br>Við loyvdum hjálparmiðlum. Telda skal nýtast.<br>Uppgávan er BERT tøk á Wiseflow. |
| 19. mai | Føroyskt C<br>FHS/YN | 08.30 | 13.00 | Føroysk uppgáva<br>Við loyvdum hjálparmiðlum. Telda skal nýtast.<br>Uppgávan er BERT tøk á Wiseflow. |
| 20. mai | Danskt A<br>BÚS/FYR/<br>HUG/NÁT | 08.30 | 14.00 | Føroysk uppgáva<br>Við loyvdum hjálparmiðlum. Telda skal nýtast, og uppgávan verður latin inn í Wiseflow. Uppgávan er BERT tøk á Wiseflow. |
| 21. mai | Samfelagsfrøði A<br>HUG/NÁT/BÚS | 08.30 | 15.00 | Føroysk uppgáva<br>Fyrsta tíman verður arbeitt í bólkum, fyrri partur verður útflýggjaður. Síðani verður arbeitt einsæris, og seinni partur verður útflýggjaður. Við loyvdum hjálparmiðlum. Telda skal nýtast.<br>Uppgávan er BERT tøk á Wiseflow. |
| 22. mai | Spanskt byrjanarmál A<br>HUG | 08.30 | 13.30 | Donsk og føroysk uppgáva<br>Fyrri partur: Prentað uppgáva, svarast skal við hond. Uttan hjálparmiðlar.<br>Seinni partur: Prentað uppgáva, svarast skal við hond. Bert útflýggjaðir hjálpimiðlar loyvdir. |

| Dagur | Próvtøka / breyt | Møta | Enda | Viðmerking |
|---|---|---|---|---|
| 22. mai | Sølubúskapur A<br>BÚS | 08.30 | 14.00 | Føroysk uppgáva<br>Við loyvdum hjálparmiðlum. Telda skal nýtast.<br>Uppgávan er BERT tøk á Wiseflow. |
| 22. mai | Sølubúskapur B<br>BÚS | 08.30 | 13.00 | Føroysk uppgáva<br>Við loyvdum hjálparmiðlum. Telda skal nýtast.<br>Uppgávan er BERT tøk á Wiseflow. |
| 26. mai | Tónleikur A<br>BÚS/HUG/NÁT | 08.30 | 14.00 | Allir loyvdir hjálparmiðlar kunnu nýtast til próvtøkuna. Telda skal nýtast til báðar partar. |
| 26. mai | Lívtøknifrøði A<br>NÁT | 08.30 | 14.00 | Donsk uppgáva og umsett føroysk uppgáva<br>Uppgávan er BERT tøk á Wiseflow. Zip-fíla sum skal takast niður og opnast. Við loyvdum hjálparmiðlum. (Databók er til láns) |
| 27. mai | Virkisbúskapur A<br>BÚS | 08.30 | 14.00 | Føroysk uppgáva<br>Við loyvdum hjálparmiðlum. Telda skal nýtast.<br>Uppgávan er BERT tøk á Wiseflow. |
| 27. mai | Virkisbúskapur B<br>BÚS | 08.30 | 13.00 | Føroysk uppgáva<br>Við loyvdum hjálparmiðlum. Telda skal nýtast.<br>Uppgávan er BERT tøk á Wiseflow. |
| 27. mai | Virkisbúskapur C<br>FHS | 08.30 | 13.00 | Føroysk uppgáva<br>Við loyvdum hjálparmiðlum. Telda skal nýtast.<br>Uppgávan er BERT tøk á Wiseflow. |
| 27. mai | Týskt byrjunarmál A<br>HUG | 08.30 | 13.00 | Donsk uppgáva<br>Allir loyvdir hjálparmiðlar kunnu nýtast. Umsetingarforrit, sum kunnu umseta heilar setningar úr einum máli í annað, er ikki loyvt. Telda skal nýtast. Uppgávan er BERT tøk á Wiseflow. |
| 27. mai | Týskt framhaldsmál A<br>HUG | 08.30 | 14.00 | Donsk uppgáva<br>Allir loyvdir hjálparmiðlar kunnu nýtast. Umsetingarforrit, sum kunnu umseta heilar setningar úr einum máli í annað, er ikki loyvt. Telda skal nýtast. Uppgávan er BERT tøk á Wiseflow. |
| 28. mai | Støddfrøði A<br>BÚS/HUG/NÁT | 08.30 | 14.00 | Føroysk uppgáva<br>Fyrri partur: Prentað uppgáva einans. Uttan hjálparmiðlar – tó við einum almennum góðkendum formlasavni.<br>Seinni partur: Við loyvdum hjálparmiðlum.<br>Alt tilfarið er tøkt á Wiseflow kl. 11.00. Prentað uppgáva, seinni partur, er tøk. Undantak: Møgulig Excel fíla í støddfrøði A og B verður ikki prentað. |
| 28. mai | Støddfrøði B<br>BÚS/FYR/HUG/NÁT | 08.30 | 13.00 | Føroysk uppgáva<br>Fyrri partur: Prentað uppgáva einans. Uttan hjálparmiðlar – tó við einum almennum góðkendum formlasavni.<br>Seinni partur: Við loyvdum hjálparmiðlum.<br>Alt tilfarið er tøkt á Wiseflow kl. 10.30. Prentað uppgáva, seinni partur, er tøk. |
| 28. mai | Støddfrøði C<br>BÚS/FYR/HUG/FHS/YN | 08.30 | 13.00 | Føroysk uppgáva<br>Fyrri partur: Prentað uppgáva einans. Uttan hjálparmiðlar – tó við einum almennum góðkendum formlasavni.<br>Seinni partur: Við loyvdum hjálparmiðlum. Telda eigur at vera nýtt. Eisini er møguligt at lata inn við hond. Alt tilfarið er tøkt á Wiseflow kl. 10.00. Prentað uppgáva, seinni partur, er tøk. |
| 29. mai | Altjóða búskapur A<br>BÚS | 08.30 | 14.00 | Føroysk uppgáva<br>Við loyvdum hjálparmiðlum. Telda skal nýtast.<br>Uppgávan er BERT tøk á Wiseflow. |

| Dagur | Próvtøka / breyt | Møta | Enda | Viðmerking |
|---|---|---|---|---|
| 29. mai | Lívfrøði A<br>HUG/NÁT | 08.30 | 14.00 | Føroysk uppgáva<br>Við loyvdum hjálparmiðlum. Telda skal nýtast.<br>Uppgávan er BERT tøk á Wiseflow. |
| 29. mai | Lívfrøði A | 08.30 | 14.00 | Føroysk uppgáva<br>Við loyvdum hjálparmiðlum. Telda skal nýtast.<br>Uppgávan er BERT tøk á Wiseflow. |
| 1. juni | Franskt byrjanarmál A<br>HUG | 08.30 | 13.00 | Donsk og føroysk uppgáva<br>Fyrri partur: Prentað uppgáva, svarast skal við hond. Uttan hjálparmiðlar.<br>Seinni partur: Prentað uppgáva, svarast skal við hond. Bert útflýggjaðir hjálpimiðlar loyvdir |
| 1. juni | Alisfrøði A<br>NÁT | 08.30 | 14.00 | Donsk uppgáva<br>Uppgávan er BERT tøk á Wiseflow. Zip-fíla sum skal takast niður og opnast. Við loyvdum hjálparmiðlum. (Databók er til láns) |
| 1. juni | Evnafrøði A<br>NÁT | 08.30 | 14.00 | Donsk uppgáva<br>Uppgávan er BERT tøk á Wiseflow. Zip-fíla sum skal takast niður og opnast. Við loyvdum hjálparmiðlum. (Databók er til láns) |

# 3 Reglur um skrivligar próvtøkur og royndir

Møtiskylda er til allar próvtøkur, vár- og ársroyndir. Lóglig orsøk til ikki at møta upp er t.d. sjúka ella onnur álvarslig viðurskifti. Er næmingur sjúkur, tá ið próvtøka skal haldast, skal læknaváttan fáast til vega og latast skrivstovuni sama dag. Serligt oyðublað liggur á skrivstovuni og á glasir.fo/provtokur til hetta endamál.

Um næmingur ikki møtir upp og ikki hevur lógliga orsøk til fráveruna kann avleiðingin verða, at hann má gevast í skúlanum, ella at hann ikki fær endaligt prógv.

## 3.1 Áðrenn próvtøkan ella royndin byrjar

1. Næmingarnir skulu møta 30 min., áðrenn royndin ella próvtøkan byrjar.
2. Fartelefonir, ur og onnur amboð, sum til ber at samskifta við, eru strangliga bannaði. Heitt verður á næmingar um at lata telefonina liggja heima á royndar- ella próvtøkudegnum. Hevur næmingurin kortini telefon við, skal hon sløkkjast og latast inn í móttøkuni á 4. hædd.
3. Møtir næmingur ikki til ásettu tíð, men áðrenn ein tími er farin, kann rektarin geva honum/henni loyvi at luttaka í royndini ella próvtøkuni, um eingin grund er til at halda, at hann hevur fingið at vita nakað um, hvat stendur í uppgávuni. Næmingurin letur skúlaleiðsluni skrivliga frágreiðing um orsøkina til seinkaðu uppmøtingina. Frágreiðingin skal skrivast, áðrenn støða verður tikin til, um næmingurin sleppur til roynd ella próvtøku.
4. Skúlin hevur onga ábyrgd av telefonum, teldum og øðrum amboðum, sum næmingurin hevur við.

## 3.2 Atburður undir próvtøku og roynd

1. Næmingurin kannar eftir, um hann hevur fingið røttu próvtøkuuppgávuna.
2. Eingin næmingur má fara út úr royndar- ella próvtøkuhølinum fyrsta tíman.
3. Tað er ikki loyvt næmingum at fara frá sínum plássi ella fara úr hølinum uttan loyvi frá eftirlitsfólkunum.
4. Meðan próvtøkan ella royndin er, mugu næmingarnir einans venda sær til eftirlitsfólkini. Næmingurin má vanliga ikki fara út úr royndar- ella próvtøkuhølinum, fyrr enn hann hevur latið avrikið inn. Er neyðugt hjá næminginum at fara út, skal eitt eftirlitsfólk fylgja honum.
5. Eftirlitsfólk mugu undir ongum umstøðum vegleiða næmingar. Eru ivamál, er neyðugt at seta seg í samband við ábyrgdarhavandi leiðara, sum, um neyðugt, setir seg í samband við skúlaleiðsluna.

## 3.3 Amboð, kravdir og loyvdir hjálparmiðlar og handfaring av teimum

1. Tað er álagt næmingum at nýta teldu til ávísar próvtøkur.
   Í øðrum próvtøkum verður álagt næmingum at skriva við hond, og teir fáa tá pappír útflýggjað. Bert pappír, útflýggjað av skúlanum, kann latast inn, og allir teigar við navni v.m. skulu skrivast á síðurnar, ið verða latnar inn til próvdøming.
2. Næmingurin hevur við sær teldu, løðara, forleingjara, headset, bøkur og onnur loyvd hjálparamboð.
3. Næmingurin hevur sjálvur ábyrgd av, at teldan riggar, sum hon skal, tí roknast kann ikki við at fáa tekniska hjálp undir próvtøkuni.
4. Ongar bøkur ella hjálparamboð og einki skrivað tilfar, uttan tað loyvda, má vera á plássinum hjá næminginum í royndar- ella próvtøkuhølinum.
5. Næmingurin hevur sjálvur ábyrgd av at hava tað loyvda tilfarið við til royndina ella próvtøkuna.
6. Skúlin hevur ikki møguleika at læna næmingum lærubøkur, og tí er sera umráðandi, at næmingurin minnist til at hava við sær loyvd hjálparamboð, íroknað lærubøkur og annað tilfar.

## 3.4 Nýtsla av neti og KT, tá ið royndin fer fram

1. Eitt serstakt net verður nýtt til skrivligu royndirnar og próvtøkurnar. Ongin atgongd er til opið internet. Próvtøkunetið eitur **Roynd2026**, og loyniorðið til netið er **Roynd2026**.
2. Næmingar hava ikki atgongd til læringsumhvørvið (Moodle) og Office 365, t.d. online útgávuna av Word. Royndarsíðan https://roynd.glasir.fo gevur tó atgongd til ymiskt undirvísingartilfar hjá m.a. Nám, Systime, Praxis og Gyldendal og orðabøkur hjá Sprotanum og Gyldendal.
3. Próvtøkunetið er tøkt frá 1. mai. Mælt verður til at royna netið í góðari tíð fyri at tryggja, at roynd.glasir.fo riggar á hesum neti, og at atgongd fæst til undirvísingartilfar.
4. Næmingar hava ábyrgdina av at hava øll neyðug forrit og skjøl á telduni. Næmingar, ið skulu nýta e-bøkur ella s-bøkur, sum ikki eru tøkar smb. pkt. 2, skulu taka hesar niður á telduna, áðrenn royndin ella próvtøkan byrjar. Somuleiðis má næmingur taka tilfar á Moodle og Office 365, sum hann ynskir at nýta, niður á telduna. Skúlin stendur ikki til svars, um næmingurin ikki hevur gjørt neyðugu fyrireikingarnar.
5. Teldur mugu undir ongum umstøðum nýtast til samskifti, VPN, vitlíki ella líknandi.

## 3.5 Tá ið royndin er liðug

1. Einki tilfar ella amboð, herundir teldur, mugu takast út úr royndar- ella próvtøkuhølinum, fyrr enn próvtøkan er av, og allir næmingar hava latið inn.
2. Við atliti at øðrum næmingum er ikki loyvt at fara út úr royndar- ella próvtøkuhølinum teir síðstu 30 minuttirnar, hóast næmingurin hevur latið inn.
3. Letur næmingurin uppgávusvar inn, áðrenn 30 minuttir eru eftir av royndini ella próvtøkuni, skal hann seta seg í samband við eftirlitsfólkið, sum skrásetir klokkutíðina, tá næmingurin fer út úr royndar- ella próvtøkuhølinum.
4. Tað er ábyrgd hjá næminginum, at tað, hann hevur latið inn, er rætta uppgávusvarið. Somuleiðis váttar næmingurin á forsíðu og í WISEflow, at hann bert hevur nýtt loyvdar hjálparmiðlar.
5. Royndar- og próvtøkusvar, ið verður latið inn talgilt, verður latið inn umvegis WISEflow í PDF-formati; tó undantikið uppgávusvar í virkisbúskapi, har Excel verður nýtt.
6. Eftirlitsfólk váttar, at næmingurin fer frá royndini ella próvtøkuni, tá hann hevur latið uppgávuna inn í WISEflow og/ella á pappíri.
7. Serstakar leiðreglur um formlig krøv (hvussu tú skalt nýta síðuhøvd, síðutøl, pdf v.m.) og vegleiðing um, hvussu tú letur inn í WISEflow, verða latin øllum.

### 3.6 Eftirlit og agar í sambandi við brot á reglur

1. Í WISEflow verða uppgávusvar eftirkannað fyri svik (plagiat).
2. Skúlin tilskilar sær rætt til at kanna næmingar (taka stakroyndir) fyri at tryggja sær, at næmingar ikki hava telefonir ella onnur samskiftisamboð í ella nærhendis royndar- ella próvtøkuhølunum.
3. Um næmingurin fremur óreglusemi í sambandi við hesum reglum og smb. reglum í próvtøkukunngerðini, kann hann verða burturvístur frá roynd ella próvtøku.
4. Um próvdómararnir seinni avdúka, at næmingur hevur svikað, fingið ella givið hjálp undir próvtøkuni, kann avleiðingin verða, at uppgávan ikki verður góðkend.
5. Næmingur, sum ikki virðir reglurnar, kann verða burturvístur frá royndini beinanvegin.

*Víst verður eisini til skilhaldsreglurnar á Glasi - glasir.fo/skilhaldsreglur*

# 4 Reglur um munnligar próvtøkur og royndir

Til munnligu próvtøkurnar eru reglurnar, ið eru ásettar í námsætlanunum (http://www.namsaetlanir.net) og reglurnar í próvtøkukunngerðini frá 22. januar 2013 við seinni broytingum, galdandi. Møtiskylda er til allar próvtøkur og ársroyndir. Lóglig orsøk til ikki at møta upp er t.d. sjúka ella onnur álvarslig viðurskifti. **Er næmingur sjúkur, tá ið próvtøka skal haldast, skal hann boða skúlanum frá sum skjótast á telefon 616600, og læknaváttan latast skrivstovuni sama dag umvegis post@glasir.fo**. Serligt oyðublað liggur á skrivstovuni og á glasir.fo/provtokur til hetta endamál.

Um næmingur ikki møtir upp og ikki hevur lógliga orsøk til fráveruna, kann avleiðingin verða, at hann má gevast í skúlanum, ella at hann ikki fær endaligt prógv.

1. Munnligu próvtøkurnar og royndirnar byrja kl. 08:10, um ikki annað er avtalað.
2. Næmingarnir fara til próvtøku og royndir eftir flokslistanum, um einki annað er avtalað.
3. Næmingur, sum ikki møtir ella kemur ov seint til próvtøku ella roynd, kann ikki krevja at sleppa upp. Eru próvhoyrari og próvdómari samdir, kunnu teir sleppa ov seinum næmingi til munnliga próvtøku ella roynd.
4. Um steðgur kemur í próvtøkuna ella royndina, tí eingir næmingar eru, verður ikki bíðað eftir næmingum, og teir, sum ikki eru møttir til tíðina, verða roknaðir sum ikki møttir.

5. Mannagongdin er ymisk í ymisku lærugreinunum. Lærarin kunnar næmingarnar um hetta.
6. Tað er ikki loyvt at nýta internet í fyrirekingarhølinum; einans próvtøkunetið Roynd2026, sí omanfyri.
7. Fartelefonir eru ikki loyvdar á próvtøkuøkinum.
8. Í summum lærugreinum eru eingir hjálparmiðlar loyvdir í fyrireikingartíðini.
9. Í teimum lærugreinum, har hjálparmiðlar eru loyvdir, kunnu bert loyvdir hjálparmiðlar nýtast.
10. Í próvtøku- og royndarhølinum kunnu bert notat, sum eru framleidd í fyrireikingartíðini, takast við inn.

*Víst verður eisini til skilhaldsreglurnar á Glasi - glasir.fo/skilhaldsreglur*

# 5 Sjúka í sambandi við próvtøku

Tann, sum ikki kann koma til próvtøku orsakað av sjúku, kann sleppa til sjúkrapróvtøku. Treytirnar eru hesar:

1. Kann næmingur ikki møta til próvtøku orsakað av sjúku, skal hann ringja til skúlan beinanvegin um morgunin kl. 8 á próvtøkudegnum á telefon 616600.
2. Skúlin skal sama dag hava eitt oyðublað, sum er fylt út, saman við eini læknanváttan, har læknin váttar, at næmingurin var sjúkur, tá ið próvtøkan var. Oyðublaðið fæst á www.glasir.fo/provtokur.
3. Verður næmingur sjúkur undir próvtøkuni, kann hann velja at fara til lækna og verða sjúkrameldaður. Velur hann at halda fram við próvtøkuni, sleppur hann ikki til sjúkrapróvtøku.
4. Fer næmingurin til próvtøku, hóast hann er sjúkur, ber ikki til at angra og taka uppgávusvarið aftur, tá tað er latið inn. Tá ber heldur ikki til at søkja um at sleppa til endurpróvtøku.

# 7 Endurpróvtøka

1. Um einki samlað prógv er útskrivað, kann næmingur, sum til próvtøku hevur fingið 00 ella minni, innskriva seg til endurpróvtøku í somu lærugrein á sama stigi í næsta vanliga próvtøkuskeiði.
2. Næmingur, sum nýtir høvi at fara til endurpróvtøku skal nýta sama próvtøkugrundarlag sum til fyrru próvtøkuna.
3. Próvtalið frá endurpróvtøkuni er tað, sum skal við á endaliga prógvið.
4. Innskriving til endurpróvtøku fer fram í seinasta lagi 15. mars tað árið, endurpróvtøkan skal verða. Er bæði skrivlig og munnlig próvtøka í einari lærugrein, kann næmingurin skriva seg inn til endurpróvtøku í ávikavist tí munnligu og tí skrivligu próvtøkuni hvør sær.

# 8 Um svik

Próvtøku- ella royndarsvarið skal vera nemingsins egna sjálvstøðuga svar. Um próvdómari fær illgruna um, at næmingur hevur fingið ólógliga hjálp, hevur hjálpt øðrum, latið avrik hjá øðrum inn sum sítt egna, endurnýtt áður dømt avrik ella á annan hátt hevur roynt at svikað, skal próvdómarin boða rektaranum frá hesum. Málið verður kannað. Svik verður annars lýst í próvtøkukunngerðini, §25.

# 9 Kærur um próvtøkur

Næmingurin kann kæra próvtøkur og próvtøl í seinasta lagi 7 dagar eftir, at próvtalið er kunngjørt næminginum, smb. §45 og §46 í próvtøkukunngerðini. Kæran skal stílast til rektaran, vera skrivlig og skal nágreiniliga lýsa veruligu umstøðurnar, sum sambært kæraranum eru orsøk til, at kæran eigur at vera gingin á møti.

# 10 Innlating í Wiseflow

1. Tryggja tær, at tú ert loggað/ur á próvtøkunetið hjá skúlanum, sum eitur: Roynd2026. Loyniorðið til netið er Roynd2026.
2. Lat internet kagan upp og skriva: https://roynd.glasir.fo/ og trýst síðani á slóðina “WISEflow”.
3. Vel lærugreinina, tú ert til próvtøku ella roynd í.
4. Títt uppgávusvar skal latast inn í WISEflow, áðrenn tíðin er farin.
5. Minst tí til at seta tíð av til at lata inn.
6. Minst til at fara gjøgnum øll trý stig í innlatingargongdini i WISEflow:
    - Upploada uppgávusvar. Tað er tín ábyrgd at eftirkanna, at tað er rætta fílan, sum tú letur inn.
    - Útfyll kápu, har tú váttar, at uppgávusvarið er títt egna sjálvstøðuga svar, og at tú bert hevur nýtt loyvdar hjálparmiðlar.
    - Lat inn og bið um eina kvittan, eftir at tú hevur latið inn.
7. Tað er bert møguligt at lata inn eina ferð. Um tú hevur latið inn skeivt avrik, skalt tú tískil tilkalla eina próvtøkuvakt og biðja um hjálp.
8. Letur tú títt uppgávusvar inn, áðrenn 30 minuttir eru eftir av próvtøkuni, skalt tú beinanvegin seta teg í samband við próvtøkuvaktina, sum eftirkannar, at tú hevur latið inn á Wiseflow. Próvtøkuvaktin skrásetir samstundis klokkutíðina, tá ið tú hevur latið inn, og nær tú ert farin úr próvtøkuhølinum.

Tú hevur sjálv/-ur ábyrgd av at hava loyvd hjálparamboð við til próvtøkurnar.

**Tú hevur sjálv/-ur ábyrgd av, at tú dugir at goyma sum PDF-skjal.**

Tað hevur stóran týdning, at tú hevur roynt hetta áðrenn próvtøkurnar.

glasir.fo/provtokur

# ÁMINNINGARLISTI

**Hetta skalt tú minnast til at hava við til tær skrivligu próvtøkurnar:**

Teldu og telduløðara
Fimm metur langan forleingjara
Roknimaskinu
Myrkan blýant ella bláan ella svartan penn

**Loyvdir hjálparmiðlar:**
sí "Loyvdir hjálparmiðlar til próvtøkur"

**Talgilt tilfar:**
Minst til at taka talgilt tilfar niður á telduna, eitt nú e-bøkur, s-bøkur og tilfar á Moodle

**Atgongd til orðabøkur og annað loyvt tilfar:**
Tryggja áðrenn royndirnar, at tit hava atgongd til orðabøkur og annað loyvt tilfar umvegis https://roynd.glasir.fo

**Rættstavari til Word:**
Rættstavarin má virka á telduni áðrenn próvtøkurnar, tí avmarkað atgongd er til internet undir próvtøkunum

GLASIR
TÓRSHAVN COLLEGE